asfalt

Frá 2. til 3. juni
Frá Nólsoyar Páll til Steinatún
Frá punki til kórsang
Frá 0 til 100

Frá Føroya Banka til tónleikin

REPROZ

TÓRSHAVNAR KOMMUNA · miðlahúsið í Vágsbotni · faroeJet · FØROYA BANKI

# Grindaformaður fann sjálvur grindina



*Umleið 170 hval løgdu beinini á Syðrugøtusandi í morgun*

*Mynd: Sólvá Olsen*

**Ein grind á umleið 170 hval legði beinini á Syðrugøtusandi í morgun. Grindin varð sædd av landi, og grindaformaðurin var sjálvur annar fyrstur hjá grindini**

GRIND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Einir 170 hval løgdu beinini á Syðrugøtusandi í morgun.

Tað var sjálvur grindaformaðurin, Martin Juul Jarnskor, sum saman við Andras Hansen fann grindina.

– Andras koyrdi konuna til Gøtugjógv, tá hann ringdi til mín - hann helt seg síggja okkurt úti á víkini. Vit fóru í bátin og funnu grindina, greiðir Martin Juul Jarnskor frá.

Hann sigur eisini, at hetta var væntandi.

– Vit hava sæð so nógvan bak á víkini seinastu tvær vikurnar. Tað hevur verið vársildin, og so er grindin komin aftaná, sigur Martin Juul Jarnskor.

Drápið gekk væl. Hóast grindin ikki gjørdi landgongd, so gekk væl at hála hvalirnar upp á sandi við nýggja sóknaronglinum, greiðir grindaformaðurin frá.

– Vit hava talt oman fyri 150 nú, og eg haldi eini 20 munnu vera eftir, sigur hann.

Martin Juul Jarnskor veit ikki, hvussu grindin verður býtt. Bert 17 bátar vóru við í drápinum, og grindaformaðurin vónar, at gridin verður býtt til tær bygdirnar, sum vanliga ikki fáa grind so ofta, eitt nú Gjógv, Funningur og Hellurnar, sigur hann.

Finningarhvalurin er ein 25 skinshvalur, sum Martin Juul Jarnskor og Andras Hansen býta sínamillum.

DAGVAKT

SMS SØKIR EFTIR

**Vaktarhald í SMS**
Tað eru fýra føst vaktarfólk knýtt at SMS, tvær dagvaktir og tvær náttarvaktir.
Høvuðsuppgávan hjá vaktunum er at standa fyri trygdini í húsinum umframt at røkja ymiskar praktiskar uppgávur.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá vaktunum í SMS er at standa fyri trygdini í og uttanfyri SMS. Vaktin hevur ábyrgd av, at viðskiftafólk kenna seg trygg í SMS, bæði hvat víðvíkur ferðslu millum hini vitjandi, og tá tað kemur til brunaskipanir, rýmingavegir, eldsløkkingarskipanir v.m.
Umframt eftirlit við trygdini hevur vaktin ymiskar praktiskar uppgávur, ið serliga eru tengdar at felagsøkjunum í SMS. Hesi uppgávuøkir fevna m.a. um ventilatiónsviðurskiftini, lyfturnar, felags ljósskipanirnar, og eisini hjálpir vaktin til við praktiskum uppgávum, tá tiltøk eru á Torginum. Bygningurin SMS er stórur og rúmar eina rúgvu at hentleikum og tænastum, so roknast kann við nógvum ymiskum praktiskum uppgávum.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, ið er ábyrgdarfullur, væl skipaður, arbeiðssamur og dugir væl við fólki. Ymisku praktisku uppgávurnar krevja samstundis, at viðkomandi, ið settur verður, hevur breiðan praktiskan førleika og handaligt hegni.

**Arbeiðstíðir**
Dagvaktin arbeiðir mánadag til sunnudag frá kl. 10.00 til kl. 23.00 og hevur frí aðru hvørja viku.

**Løn**
Løn sambært avtalu

**Umsóknir**
Áhugaði kunnu senda skrivliga umsókn til SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn, og hon skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl.
Eru spurningar ber til at ringja til Ninnu Vatnhamar, tel. 55 88 88.

SMS



PAM søkir elektrikarar til arbeiði í Norra

Av tí at eftirspurningurin eftir dugnaligum elektrikarum til arbeiði í Norra økist, hava vit brúk fyri fleiri fólki.

Talan er um útbygging av gassverkætlanini "Snøhvit", ið Statoil letur byggja á oynni Melkøya uttanfyri Hammerfest, og "Ormen Lange", sum Hydro letur byggja á Aukra uttanfyri Molde.

Arbeitt verður tvær vikur, og frítíðin er tríggjar vikur.

Hevur tú áhuga í hesum starvi og uppfyllir nevndu krøv:

- Tú ert elektrikari, helst við 3 ára royndum
- Dugur at samskifta á norðurlendskum máli
- Ert álítandi, ágrýtin og samvitskufullur

vilja vit fegin hoyra frá tær. Ring og hoyr nærri hjá:

**PAM Offshore Service**

Anju Jacobsen
á telefon 30 11 39;
fartelefon 50 11 39
ella á telduposti:
anja.jacobsen@faroeyard.fo

P A M Offshore Service

PAM Offshore Service
J.C. Svabosgøta 31
Postboks 65
110 Tórshavn

Tel 30 11 39
Fax 30 11 01
pam@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

*PAM Offshore Service P/F er dóttirfelag hjá Tórshavnar Skipasmiðju P/F og veitir tænastur til frálandavinnuna. Í løtuni starvast yvir 30 fólk hjá okkum í hesi vinnu.*